# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni verður sunnudagin 4. juli. Minningardagurin verður hildin við, at blómur verða lagdar út á støðini, har ferðsluvanlukkur hava verið kring landið.

Tað er stigtakarin til minningardagin, Ingi Gunnarsson, við hjálp frá limum í áhugafelagnum Føroya Ellisakførum og fólki kring landið, sum leggja blómurnar út.

Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni hevur verið hildin á hvørjum ári síðan 2000 við undantak av í fjør.

Eisini hevur verið tøgn í ein minutt áðrenn fótbóltsdystirnir í bestu fótbóltsdeildini byrja hendan dagin, men sunnudagin 4. juli er bert ein dystur í Vodafone deildini.

Siðvenja hevur eisini verið, at kirkjur og samkomur í tøgn minnast tey deyðu í ferðsluni hendan dagin.



*Stigtakarin til minningardagin Ingi Gunnarsson*

# TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Johannes E. Djurhuus**

(Hanneba)

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum á Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, fyri tað, tit vóru fyri hann.

Takk til Bjarna Bech prest fyri góð og troystarrík orð, takk til sangarar og kirkjutænarar.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, og takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Familjunnar vegna***

***Tove og Winnie***


SJÓVAR KOMMUNA

## Leiðari til dagstovnin Lítlafløtt á Strondum

**Søkt verður eftir námsfrøðingi í leiðarastarv á dagstovninum Lítlafløtti á Strondum. Talan er um eitt farloyvisstarv fyribils til hálvan august 2011. Vit ynskja, at tann, ið settur verður, kann byrja 1. sep. 2010 ella so skjótt til ber.**

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum.

**Leiðarin hevur eisini ábyrgd av:**

- at starvsfólk trívast og mennast
- at samskifti við foreldur og avvarðandi er gott
- at støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og treytunum, sum stovnurin virkar undir
- at samstarva við kommunalu umsitingina og viðkomanda stovnar/myndugleikar

**Vit vænta, at tú**

- hevur útbúgving sum námsfrøðingur
- hevur royndir innan dagstovnaøki
- hevur royndir innan umsiting
- verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi
- kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og aðrar fakbólkar
- hevur gott yvirlit, megnar at skipa dagin og er ígongdsetandi

Lítlifløttur er normeraður til 84 børn + frítíðarstovu til 1. og 2. flokk.

Lønarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 472727.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum umsøkjararnar ella ongan at seta.

Umsókn við avritið av prógvum og viðmælum skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. august kl. 13.00, og sendast til:

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

Sosialurin 341800


# Merkisdagar

### Silvurbrúdleyp

5. juli hava Ruth og Annfinn Brekkstein, á Stórheyggi 2 Velbastað, verið gift í 25 ár. Vælkomst verður leygardagin 10. juli millum kl. 11 og 16 í róðrarneystinum á Argjum, har vit hava »Brunch«. Vit gleða okkum at síggja familju, vinir og kenningar hendan dagin. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarligast biðin at siga frá á abv@olivant.fo ella ringja tlf. 328058, 215800 ella 215810, í seinasta lagi mánadagin 5. juli.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 6. juli hava Ann og Jógvan Petersen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbodnum.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 27. juli hava Sonja og Poul í Leirvík verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey sum ynskja at koma, verða biðin at siga frá innan 18. juli, á tlf. 743058 (Sonja), tlf. 589080 (Poul) ella skriva til poul_p@post.olivant.fo

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli verður Hans Marius (Lilleven) Johansen, Tvøroyri 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Lilleven henda dagin eru hjartaliga vælkomin á Hotel Tvøroyri ímillum kl 11.00 og 15.00.

### 85 ára føðingardagur.

Mánadagin 5. juli verður Hugo Fjørðoy, Sørvági, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnum og barnabørnum.

### 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin, 2. juli verður Heini Olsen, Tórshavn, 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Heina, eru hjartaliga vælkomin í Kovalág 10, 2. juli millum kl. 10 og 14.

### 80 ára føðingardagur

Tann 11. juli fyllur Leivur Eidesgaard Poulsen, Korndalsvegur 1, 470 Eiði, 80 ár. Døgurði verður í í EB-húsinum á Eiði leygardag 10. juli kl. 17 (stundisliga). Tey ið vilja verða við til at gera dagin hugnaligan fyri Leivur, kunnu tekna seg hjá Margit tlf.: 423454 innan 1. juli.

### 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 4. juli verður Bergtóra Lamhauge, búsitandi Barken 24, Hjerting, DK-6710 Esbjerg V., 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

### 70 ára føðingardagur

3. juli verður Hjørleif Johannesen, Vágur, 70 ár. Vælkomst verður sunnudagin 4 juli á hotell Bakkanum í Vági frá kl 13.00 til 18.00 .

### 65 ára føðingardagur

Fríggjadagin 2. juli fyllir Óli A. Jacobsen, Ovaragøta 19 Hoyvík, 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. juli frá 10-15, hjá Jonnu og Andreas, Einarsgøtu 2 Hoyvik. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 ára føðingardagur

Hósdagin 15 juli verður Páll Petersen, Kaldbak 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 17. juli frá kl 11 til 16. í Pálsstovu. Gott at sæð familiu, vinir og kenningar til brunch hendan dagin.

### 60 ára føðingardagur

Mikudagin 4. august verður Heiðveig Tindskarð, Tórshavn, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 1. juli á tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### 30 ára føðingardagur

27. juli fyllir Theodor Esmar Hansen 30 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. juli kl. 18 í Bowling í Leirvík. Tey, ið vilja gleða Theodor Esmar við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 15. juli á tlf. 421309 ella 721309